Full ferð á

Framtíðarætlanirnar eru nógvar og full ferð er á framleiðsluni hjá Injektor Door, sum síðsta mánað framleiddi 17 sett av trollemmum. 23 fólk arbeiða á virkinum

Hjá Injektor Door í Vági gongur framleiðslan av lemmum til trolarar og aðra sjóvinnu við rúkandi ferð í nýggju framleiðsluhøllini, men longu nú eru ætlanir um útbygging

VINNA
Dagfinn Olsen

Lemmar til trol og aðra sjóvinnu verða framleiddir í Vági. Injektor Door hevur við sínum nýskapandi og orkusparandi vøru veruliga fingið fótin fastan á marknaðinum og kring knøttin fara trollemmarnir hjá Injektor Door og verða væl fagnaðir. Keyparar boða frá góðum fiskiskapi og lækkandi orkuútreiðalum.

Ferð á

Arbeiði er til nógvar hendur á virkinum hjá Injektor Door, har full ferð er á framleiðsluni. Fyri ikki so langari tíð síðani flutti fyritøkan í egna framleiðsluhøll.

Høllin er eini 700 fermetrar. Men longu nú hava menninir handan Injektor Door ásannað, at høllin er nakað lítil. Teir hava tí ætlanir á tekniborðinum um eina høll afturat. Talan er um eina høll, ið skal standa við síðuna av hinari høllini. Nýggja høllin verður ætlandi einar 350 fermetrar og skal m.a. hýsa kantinu og skrivstovum.

Sum skilst, eru nogv jørn í eldinum og framtíðarætlanirnar eru nógvar. Fyritøkan í Vági útflytir stóran part av framleiðsluni og hevur eisini egið sølulið í Danmark.

Stórt

Injektor Door er stórt virkið. Men eisini sjálv framleidda vøran er stór. Nakrir av nýggju trollemmunum eru so stórir, at truppult er við hølisviðurskiftunum. Tá vøran kann vera meira enn 5 metrar høg og meira enn 4 metrar breið, so skulu t.d. breiðar hurðar til, fyri at fáa lidnu vøruna úr høllini. Hesir trollemmarnir eru eisini sera tungir, men hjá Injektor Door framleiddir soleiðis, at teir eru lættari enn vanligt. Fyrr vigaðu hesir 8 tons, men frá Injektor Door viga teir 6,3 tons, so teir eru sera lættir og harvið eisini orkusparandi.

Arbeiðsfólkini hjá Injektor Door arbeiða í tveimum vaktum, so ferð er á stóran part av døgninum og stóran part av vikudøgunum.

Síðsta mánað eydnaðist at framleiða heili 17 sett av trollemmum og hetta eru menninir handan virkið væl nøgdir við, men eftirspurningurin er so stórur, at framleiðslan støðugt er ein roynd at framleiða so nógv, sum gjørligt.

23 fólk arbeiða hjá Injektor Door.

Pakkhúsið nærkast

Leingi hevur verið arbeitt uppá Stóra Pakkhús í Vági, sum er gamalt og søguligt hús, ið liggur við líka søguligu Garðabrúnna. Garðabrúgvin varð sett í stand fyri nøkrum árum síðani. Fyri nøkrum árum síðani tóku feløg seg saman um ætlanina at seta í stand Stóra Pakkhús, ið umframt at hýsa feløgunum, skal vera mentanarhús. Menn hava arbeitt miðvíst við hesi ætlan og sær húsið vakurt út, nú tað sigst, at tað er klárt at lata dyrnar upp einaferð í oktober. Fjølþáttað mentanarvirksemi skal eftir ætlan rúmast undir lonini; sangur, leikur og aðrar framførslur og tiltøk av ymsum slag. Eisini bingo, gerst tað aktuelt, og fyrireikað verður eisini í hesum døgum til bingospæl til frama fyri Stóra Pakkhús. Húsið og Garðabrúgv skapa saman eitt hugnaligt umhvørvi við sjóvarmálan, eftir at økið var heldur illa farið av tíðarinnar tonn og gloymsku, hóast staðið var miðdepil fyrra helming av farnu øld.

VIÐMERKINGAR

Ríkisfelagsskapurin gevur møguleikar

Marjus Dam
Løgtingsmaður

Hví royna at minka Ríkisveitingina við uml 400 milliónum krónum tá aðrir skulu taka við.

Er tað fyri at gera "fortreð", kann ein spyrja.

Núsitandi samgonga skaðilig

Eftir at fleiri tung ár hava verið dagligi dagurin hjá føroyska borgaranum, sást nú ein glotti fyri framman. Mangt av tí, ið vit ikki hava fingið gjørt í samfelagnum vegna vánarliga fíggjarstøðu, kann gerast nú. Nú er yvirskot. Vit kunnu. Og innan øll samfelagsøkir er tørvur á íløgum.

o Skattir eiga at lækkast.
o pensiónir eiga at økjast.
o Umstøður eiga at verða bjóðaðar okkara veiku og brekaðu. (Dagligi dagur teirra og teirra næstringum er ein kampur at yvirliva).
o Innan sjúkrahúsøki, eins og heilsuverki annars, er tørvur á stórum ábótum.
o Innan skúlaverkið skulu stórar íløgur gerast frá fólkaskúla til Fróðskaparsetur.
o Skúlin á Trøðni má uppprioriterast, so tey, ið hava ein serligan tørv, fáa hendan nøktaðan.
o Fiskivinnuskúli eigur at verða bygdur.
o Útoyggjapolitikkur má fremjast.
o Nógvir av skúlum okkara eru so illa farnir vegna tørvandi viðlíkahald, at støðan har er nærum líka ring sum á Landssjúkrahúsinum. Og tað sigur ikki so lítið.
o Innan samferðsluøkið skulu stórar og neyðugar íløgur gerast. Av hesum kunnu nevnast nýggjur Smyril og ferjulegur í hesum sambandi. Undirsjóvartunnil til Klaksvíkar. Nýggj tunnil í Hovi. Fyri bert at taka í rúgvuna.
o Íløgur fyri milliardir eru neyðugar at gera.

Peningur neyðugur:

At fremja viðlíkahald og nýíløgur krevur nógvan pening.

Tí undrar tað almikið, at núsitandi samgonga við einum frímerki hevur kutað 400 milliónir av blokkinum. Uttan at nevna eitt orð um, hvørjar uppsøgnir skulu fremjast og hvørjar íløgur ikki skulu gerast. Sambært Hvítubók gjørdi blokkurin, at almenni sektorurin var ov stórur. Men undir hesari samgongu er almenni sektorurin bert vaksin. Um blokkurin skal skerjast, hvar skal so skerjast innan almenna økið? Hvussu nógv fólk skulu sigast úr starvi.

Í uttanlandanevndini var spurt um konsekvensin av hesum ógvusliga kuti. Svarið frá búskaparráðnum var greitt. Vit hava ongan kapacitet í Føroyum til at svara hesum spurningi. Og Landstýrismenninir vistu onki. Ella vildu onki siga um hetta. Helst tí val verður skjótt!

80 ara politikkur umaftur:

Tá núsitandi samgonga fremur slíkar stórar fíggjarligar skerjingar, uttan at greina stutt og langtíðar árin niður í minsta lut, hevur føroyska tjóðin ein stóran trupulleika. Nevniliga, at 50.000 føroyingar aftur eru vornir brikkar hjá einum landstýri, ið gamblar við lagnuni hjá føroyingum. Hetta er 80- ara politikkur í stórum stíli. Ein skuldi trúð, at tað hevði áhuga hjá samgonguni at greina árinini av 400 milliónа skerjing árliga fyri øllum føroya fólki. Og skerdu møguleikar at fremja mangar íløgur í komandi árum. Um bert hetta fyrsta loysingarstigið verður framt, so missir føroyska samfelagið 2 milliardir hvørt valskeið. Og tað hevur týdning.

At skriva álit eftir álit loysir ongan trupulleika:

Hendan samgonga hevur skrivað álit eftir álit um teir mongu stóru samfelagsligu trupulleikar mangir bólkar og økir hava í landi okkara (útoyggjar, økismenning, menningartarnaði, eldrapolitikkur og røkt o.s.v.)

Men at loysa trupulleikarnar, ið álitini vísa, krevur pening. Hendan pening hevur samgongan ikki vilja játtað, men hevur lagt hann til viks. So trupulleikarnir eru bert verri, enn tá ið samgongan tók við.

Tí onki mál verður loyst innan skúlaverki, heilsu og almannaverki, samferðsluverkið við at skriva álit og halda fram við at spara innan økir har tørvur er á øktum játtanum.

Um Ríkisveitingin skal skerjast við knappari hálvari milliard so er ein relevantur spurningur hjá føroyingum: Hvørjar íløgur skulu ikki gerast?. At skerja burtur stóran part av fíggjarlógini merkist sjálvandi mangar staðir. HVAR?. Tað eigur landstýrið at svara uppá. Hvítabók arbeiddi við einum modelli uppá 15 ár. Og tað steðgaði øllum framburði her á landi, førdi til arbeiðsloysi og lønarniðurskurð. Leisturin Landsstýrið nú hevur lagt hevur ein tíðarhorisont uppá 4 ár - har 1/3 av blokkinum verður tikin burtur beinanvegin. Verður støðan so hættislig, at landstýrið als ikki torir at siga fólki tað?

At byggja Brimil fyri 90 milliónir (120 milliónir) krónur var gjørt uttanlanda eftir mikið kjak. Eitt frímerki og ein politisk neyðsemja kutar 400 milliónir burtur uttan kjak ella nakrar kanningar. Slíkt er ábyrgdarloysi. At hava eitt mál er eitt - men at sýna slíkt ábyrgdarloysi er eitt brotsverk.

Alternativið:

At sleppa undan køvandi oki hjá núsitandi samgongu, má hjá mongum føroyingi kennast sum at fáa fríska luft í lunguni, eftir at vera nærum kvaldur. Møguleikan fáa allir føroyingar skjótt. Vónandi verður tá aftur ein møguleiki at venda aftur til ein politikk, har framburður í landinum verður nýttur føroya fólki at gagni. So at mong av stórmálunum, ið vit hava skyldu at fremja vera loyst.

Við at játta pening til at fremja uppgávurnar. Í Mikinesi, Fugloy eins og í Suðuroy Tórshavn og Vágum.

Tað eru stórar uppgávur í liggja fyri framman.

Tær skulu fremjast í verki - ikki bert konstaterast í einum áliti.

Og ríkisrættarligu viðurskiftini vilja vit fegnir SAMRÁÐA uppá pláss. Vit vilja gera Ríkisfelagsskapin betri við eini nýggjari avtalu ímillum líka partar í ríkinum.

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:
- At vera sjónligt og skapa tryggleika og trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur ikemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur verða hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgarunum.

Eitt arbeiði allan sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi í politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er altíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú um tú ert egnaður til politiarbeiði fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðra staðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:
- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meira kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 14 48 Fax 31 82 66
Heimasíða: www.politi.fo